

**11. juli 2025**

**Kristian Mohr Heen**
Journalnr. 25/20253

# SØLA AV KORONALONIRAR

Vegna Landssjúkrahúsið verða 10 lonir settar til sølu við samanbindandi gongd. Keyparin hevur sjálvur ábyrgd av at taka lonirnar burtur. Tær verða seldar samlaðar.

## 1.0 KUNNING UM LONIRNAR:

1. Lonirnar blivu innrættaðar eftir tekning í fylgiskjal 1, ið bleiv gjørt í samstarv við LS. (Har bleiv gjørd ein broyting, at allar lonirnar blivu settar síð um síð)
2. Lonirnar eru hitaðar við el-hita, luft/luft hitapumpur og elpanelir.
3. Allar 8 songjarstovurnar fingu gjørt WC og gongd/slúsu.
4. Ein lon bleiv innrætta til  starvsfólkahølið.
5. Ein lon bleiv innrætta til skolirúm.
6. Útieindirnar til hitapumpur eru í ringum standi uttaná, men kunnu helst brúkast eina tíð afturat. Men tær eru ikki býttar soleiðis at ein er á hvørjari lon. Tá lonirnar verða sundurtiknar, mugu flestu útieindirnar tí demonterast. Gassið súgvast úr og rørini frákoblast..
7. Airmaster eind er í hvørjari lon
8. Landssjúkrahúsið tekur sítt út. Tað er leysafæ og skáp, og brunatalva, eltalva í gongini og ljósarmatur í gongini. Hetta verður gjørt áðrenn keypari flytir lonirnar
9. Ein gongd ið bindir allar lonirnar er eisini partur av søluni.

## 2.0 TILBOÐSFREIST OG INNLATINGARSTAÐUR

Tilboð skulu latast inn talgilt til teldupost krhe@lv.fo.

Tilboð skulu latast inn í seinasta lagi:

**<u>Fríggjadagin, 29. august 2025 kl. 14.00</u>**

## 3.0 SPURNINGAR OG VIÐMERKINGAR KUNNU GERAST TIL:

Kristian Mohr Heen
Tlf.: 290 880
Teldupostadressa: krhe@lv.fo

## 4.0 SÝN Á STAÐNUM

Møguligt er at síggja lonirnar eftir avtalu í viku 33 og 34 í 2025. Skriv til krhe@lv.fo um hetta hevur áhuga.

## 5.0 TILLUTANARTREYTIR

Øll tilboð skulu umfata keyp av allar 10 stk lonir, gongdina og keyparin skal sjálvur skipa fyri at burturbeina lonirnar.

Lonirnar skulu vera burturbeindar í seinasta lagi 1. oktober 2025. Arbeiði við at flyta lonirnar skal fylgja almennu reglunum um trygd og arbeiðsmannagongdir.

Landsverk tekur av við hægsta boð sum uppfyllir treytirnar, og Landsverk kann havna øllum tilboðum um einki livir upp til treytirnar.

## 6.0 FYRIVARNI/ALTERNATIV TILBOÐ

Tilboð við fyrivarni kunnu vera í vanda fyri at verða havnað.
Alternativ tilboð verða ikki tikin við í tilboðsmetingina.

## 7.0 KRØV TIL TILBOÐIÐ

Tilboðið skal latast inn á føroyskum.

Tilboðið skal lúka tær treytir, sum standa í pkt. 5.0 tillutanartreytir.

Prísurin skal framganga á undirskrivaðum skjali, saman við kontaktupplýsing so sum navn, adressa, teldupost og telefonnummar. Hettar skal sendast til krhe@lv.fo seinast 29. august 2025 kl. 14.00.

Vinaliga

**Kristian Mohr Heen**
Fulltrúi

## 8.0 FYLGISKJØL

Fylgiskjal 1: Tekningar av lonunum
Fylgiskjal 2: Myndir av lonunum

Fylgiskjal 1: Tekningar av lonunum




Tegn. 601

Fylgiskjal 2: Myndir av lonunum

Mynd 1: Airmaster eind sum er í hvørjum rúmi



Mynd 2: Hitapumpir




INVERTER
Panasonic

Mynd 3: Inni í lonunum




OneMed





Myndir 4: Gongd



